Skotar missa eina milliard

Skotska Premier League fær eftir øllum at døma stórar fíggjarligar trupulleikar, nú Setanta, sum hevur rættindi til bæði ensku og skotsku Premier League fer í gjaldssteðg. Avtalan millum Setanta og skotsku Premier League hevur eitt virði upp á eina milliard krónur í fýra ár. Setanta hevur eisini rættindi til ensku Premier League, men har hava tey teknað trygging móti støðuni, sum nú er ímkomin.

Newcastle til Singapore

Ein bólkur av íleggjarum úr Singapore sigst vera til reiðar at keypa Newcastle, sum í ár flutti niður úr ensku Premier League. Mike Ashley, sum hevur átt meirilutan í felagnum, hevur sett felagið á sølulistan, og nú ljóðar, at tað mest sannlíkt verður úr Singapore, at nýggju eigararnir koma. Fyrrverandi enski landsliðsspælarin, Steve McMahon, stendur á odda fyri samtakinum, verður skrivað í enskum miðlum.

Skálamenn seta sær stóran setning

Teir vóna og rokna við, at kappróðurin verður liðugur í góðari tíð, áðrenn fótbóltsdysturin verður klokkan seks

KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Í kvøld fara teir at leggja síðstu hond fyrireikingarnar til FM kappróðurin á Skála í morgin. Tá ið Fjarðastevna seinast var á Skála, var alt liðugt klokkan 17.05, og hetta ætla teir eisini at klára í morgin:

- Vit hava tveir fastar startir. Barnaróðurin verður kl. 13, og tað verður fastur startur á 500 metrum. Tá ið barnaróðurin verður liðugur, flyta vit henda startin út á 1500 metrar. Hin starturin verður í kvøld lagdur á 1000 metrar, og tann startin fara vit at flyta út á 2000 metrar, tá ið róðrarnir av 1000 metrum verða avgreiddir. Síðst var hetta eingin trupulleiki. Vit eru nógvir teir somu, sum fáast við hetta. Hann sigur frá góðum veðri, og tí rokna vit við, at tað eisini fer at ganga væl hesa ferð.

Tað sigur Jógvan Pauli Christiansen, sum er formaður í kappróðrarfelagnum á Skála.

Róðrarøkið á Skála er sera høgligt, bæði fyri rógvarar og áskoðarar. Róð verður fram við havnarlagnum. Endamálið er 100 metrar innanfyri bedingina. 1000 metra málið er norðanvert bátahylin, 1500 metra málið er við Prestá, og 2000 metra málið er við Múllers hús.

Hesa ferð skulu 10-mannaførini rógva 2.000 metrar. Í Klaksvík var longsti teinurin 1.500 metrar

savnsmynd

Styrkisroynd á 2.000 metrum

Tað er lagt upp til tætta kapping, tá ið 10 mannaførini í morgin fara at rógva fyrsta av fýra kappingum á longsta róðrarteininum

KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Á Norðoyastevnu síðsta leygardag var stórur spenningur í summum av róðrunum. Størsti spenningurin var í kappingini millum 10-mannaførini, tá ið Eysturoyingur og Klaksvíkingur fóru stavn um stavn um málið.

Í Klaksvík kappaðust 10-mannaførini á 1.500 metrum. Í morgin fara tey at kappast á 2.000 metrum. Hetta verður fyrsta av fýra ferðum, at tað í summar fer at verða kappast á longsta róðrarteininum:

Annan leygardag verður kappróður á Sundalagsstevnu í Kollafirði, 27. juni verður róð á Jóansøku á Trongisvágsfirði, og 4. juli verður kappróður í Fuglafirði. Tær báðar síðstu ferðirnar verður kappast á styttsta teininum – á Vestanstevnu í Sandavági 11. juli og so á Ólavsøku.

Nýggjur Svanur flotaður í morgin

Á Skála halda tey, at áhugin fyri kappróðri er vaksandi, nú tað ikki gongur so væl í fótbóltinum, sum tað hevur gjørt nógvu tey seinastu árini

KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Skála er gomul kappróðrarbygd. Í seksti árunum vann 8-mannafarið Sølmundur við manning av Skála skipasmiðju nógvar róðrar. So var tað, at skálamenn fingu sær 10-mannafar, og Skálabáturin hevur mangan gjørt um seg. Tølini siga, at hann hevur verið FM vinnari í 1992, 1993 og 1994.

Frá 1964 og fram til 1972 varð tað í einum róðri eftir Ólavsøku kappast um FM heitið. Sølmundur vann í 1964, og Skálabáturin vann í 1969, 1970, 1971 og í 1972.

Seinastu árini hevur verið mest sum øskukalt í kappróðrinum á Skála. Áhugin fyri fótbólti hevur verið ógvuliga stórur, nú tað hevur gingið so væl hjá besta liðnum. Nú gongst ikki so væl við fótbóltinum, og nú tykist áhugin fyri kappróðri aftur at økjast.

Hetta sæst eitt nú aftur í, at felagið hevur latið nýtt 5-mannafar smíðað. Sámal Hansen hevur smíðað, og báturin verður flotaður fyri fyrstu ferð í morgin. Nýggi Svanur fer at taka lut við tveimum barnamanningum í morgin. Manningarnar hava vant við Strípuni, sum strandingar eiga.

Svanur hevur áður vunnið nógvar sigrar. Kvinnurnar vunnu FM í 1975, og dreingirnir hava verið meistarar í 1979, 1980, 1981 og 1982 og aftur í 1984.